# Bakarasveinur til Mylnuna

Søkt verður eftir bakarasveini. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Vit seta teg inn í okkara arbeiðs- mannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, Postboks 1059, 110 Tórshavn – ella ring til Eirik á tel 214456




**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy. Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
**telefon 22 08 49**

# Sólir til sølu



4 Ergoline Avantgarde sólir og ein massagustólur við øllum tilhoyri. Myntautomat og kremautomat fylgja eisini við, ca. 3-4 ára gamlar.
Eru sum nýggjar

Tlf. 533201

i

Sosialurin

**Frá Læraraskúlanum**

Freistin at senda umsókn til lærara- og pedagogútbúgvingina er 16. juni.

Umsóknarbløð liggja á heimasíðuni *www.flsk.fo*

Føroya Læraraskúli
Postrúm 348
FO-110 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Deildarleiðari til Bráðdeildina (G1) á Landssjúkrahúsinum

Í nýggja bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum eru intensiva deildin, viðrakningin, skurðdagstovan, bráðfeingismóttøkan/skaðastovan sjúkrarøktarfakliga skipað í eina deild, Bráðdeildin (G1).

Av tí, at deildarleiðarin skal røkja aðrar uppgávur í eitt avmarkað tíðarskeið, søkja vit eftir einum deildarleiðara at byrja 1. august 2006 ella eftir nærri avtalu og fyribils í eitt hálvt ár fram.

Næsti fyrisetti er depilsleiðslan á Bráðdeplinum.

Vit søkja eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi við drúgvum fakligum royndum innan omanfyri nevndu øki og við góðum samstarvsevnum.

**Deildarleiðarin skal hava:**
- fakligu menningina av deildini
- ta dagligu leiðsluna av deildini
- ábyrgd av sjúkrarøktini
- starvsfólkaleiðslu
- fíggjarábyrgd

Viðkomandi skal tryggja, at deildin virkar eftir virðisgrundarlagnum hjá Landssjúkrahúsinum og hava neyvt samstarv við nógvar ymiskar fakbólkar og deildir.

Deildin hevur pláss fyri 5 intensivum sjúklingum og tekur ímóti bráðfeingis sjúklingum. Harumframt er viðrakningin við plássum fyri 5 sjúklingum, skurðdagdeild við plássum fyri 4 sjúklingum og bráðfeingismóttøkan/skaðastovan eisini undir dagligu leiðsluni av deildarleiðaranum.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning

**Vit søkja eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi, sum hevur**
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- drúgvar fakligar royndir
- leiðsluútbúgving
- leiðsluroyndir
- áhuga í fakligari menning av røktarstarvsfólkum
- visiónir og er sjálvstøðug/ur og kreativur í arbeiðinum

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmálanum millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Starvslýsing og fleiri upplýsingar** fáast við at venda sær til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-post Ceci@lsh.fo ella til Margrethu Petersen, deildarleiðara á G1, lokal 5811, e-post Mape@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 27. juni 2006 kl. 12.00.

**Skivlig umsókn,** merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, c.v. og viðmælum skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo